Eysturkommuna

Mál til viðgerðar: 24/00419 Broyting av býarplani - matr. nr. 72f og 65a í Norðragøtu

Málsviðgeri: Unn Sørinardóttir Perdomo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.06.2024 | 23/24 | 24/00419-3 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 37/24 | 24/00419-3 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.09.2024 | 33/24 | 24/00419-3 |
| 4 Býráðið | 03.10.2024 | 48/24 | 24/00419-3 |

# BROYTING AV BÝARPLANI - MATR. NR. 72F OG 65A Í NORÐRAGØTU

**Málslýsing:**

Ynski er um, at broyta part av matr. nr. 72f og 65a frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, og at matr. nr. 72g verður allur gjørdir til øki E, Almennir stovnar. Hetta fyri at framtíðartryggja møguliga útbygging av Gøtubrá í Norðragøtu.

**Lýsing, verandi støða:**

- Matr. nr. 72g liggur í dag sum øki E, Almennir stovnar og ein partur av matriklinum liggur sum øki B1, Alternativ íbúðarbygging.
- Matr. nr. 65a liggur í dag sum øki H, Frílendi.
- Partur av matr. nr. 72f liggur sum øki H, Frílendi.

**Lýsing, framtíðar støða:**

- Matr. nr. 72g verður broyttur til øki E, Almennir stovnar.
- Partur av matr. nr. 72f skal broytast frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.
- Partur av matr. nr. 65a skal broytastt frá øki H, Frílendi til øki E, Almennir stovnar, sí kortskjal.

Mælt verður til, at gera hesar broytingar í býarætlanini.

| **Ískoyti 23.09.2024.** |
|---|
| Vísandi til broytingar á matr. nr. 72f, 65a og 72g, er eisini neyðugt at gera aðrar tillagingar á niðanfyri nevndu matriklum. Talan er, um at tillaga verandi byggisamtykt við matrikul linjur.<br><br>Broytingin fevnir um matrikul nr., í Norðragøtu, 65a, 28e, 72x,<br>65b, 72c, 72v, 63a, 62, 72f, 25a, 72g, 31a og litra n.<br><br>Víst verður til viðfesta kortskjal í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.<br><br>**Ískoyti 23.09.2024**<br>Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum í býarplaninum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. juni 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. juni 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. september 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingin.

**Býráðið 03. oktober 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini dagf. 19. september 2024